# Nøvn

## Føðingar

23. september fingu Durita Bláberg Funding og Hjørleif Luid, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3510 gr.

1. oktober fingu Ebba Mortensen og Torkil Jacobsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4440 gr.

1. oktober fingu Elin Maria Petersen og Pauli Højgaard, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4360 gr.

3. oktober fingu Annbritt og Finn Johannesen, Kollafirði, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4160 gr.

4. oktober fingu Linda og Heðin Hansen, Vági, eina dóttur. Hon vigaði 3040 gr og var 50 cm long.

5. oktober fingu Dagmar L. Mouritsen og Magni Jacobsen, Syðrugøtu, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4070 gr.

7. oktober fingu Dora og Petur Olivur Splidt, Saltangará, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2900 gr. Hon eitur Bjørg.

7. oktober fingu Joan Edvør Thomasen og Ragnar Jacobsen, Kvívík, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4070 gr.

7. oktober fingu Christina og Brian Hansen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2850 gr.

7. oktober fingu Heidi og Jan Heinesen, Syðrugøtu, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4080 gr.

8. oktober fingu Arna Dam Clementsen og Sverrir Kjærbo, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3760 gr.

8. oktober fingu Beinta Lamhauge og Halltórur Dam, Tórshavn, ein son. Hann var 59 cm langur og vigaði 5780 gr.

10. oktober fingu Vinnie Larsen og Edvard Winther, Dali, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3410 gr.

10. oktober fingu Eva Petersen og Fróðin Kjærbo, Skopun, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3535 gr.

11. oktober fekk Marjun Guttesen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 3200 gr.

11. oktober fingu Anita J. Eliasen og Hans Emil Midjord, Syðrugøtu, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3825 gr.





## Tveir veiðimenn lagt árar inn

Millum teir føroysku veiðimenn, sum skaraðu fram úr í farnu øld, vóru teir báðir skálvíkingarnir Tórstein Christiansen og Eiler Jacobsen. Teir royndu seg á hvør sínum øki. Annar sum útróðrarformaður og hin sum skipari og reiðari.

Gisti í Skálavík eitt vikuskifti herfyri og fór mær ein túr fram við Stórá. Vildi skoða Grindafoss, sum seksæringurin hjá Tórsteini var uppkallaður eftir, og skálan, sum Eiler hevur reist og innilokað, í Grind.

Grindafossur var ikki so langt niðan fyri tann stóra skálan. Tá teir gjørdu grønlandsbátin hjá Tórsteini lidnan í 1962, helt hann fyri við svágin Johs. Lydersen: "So er tað navnið"

"Hví nevnir tú hann ikki Grindafoss? Tú hevur ikki gjørt annað heila lívið enn sitið undir Grindafossi og fiskað síl", svaraði svágurin, og málið var avgjørt.

"Grindafossur" gjørdist kendur um allar Føroyar fyri óføran fiskiskap. Við honum var eigarin og formaðurin Tórstein í Skálavík bestur at fiska í Føroyingahavnini øll árini, hann var formaður har, frá 1962 til og við 1968.

Til endans helt hann tó fiskiskapin vera alt ov nógv stýrdan av klokkuni. Hann kom heim úr Grønlandi við nýggja "Grindafossi", sum var meinlíkur Nordafarbátunum, og fór at rógva út undir Føroyum, nú góður bátahylur var gjørdur í Skálavík.

Navnið Grindafossur fer altíð at vera knýtt at veiðimanninum Tórsteini Christiansen, sum doyði fyri einum lítlum ári síðani, mettur av døgum. Skilji, at elsti "Grindafossur" er til enn, og at hugskot er um at fáa hann aftur til Skálavíkar.

Tað verður bæði sum eitt minni um Tórstein og hansara røsku starvsbrøður, og sum minni um eina sera áhugaverda innløgutíð við føroyska bátinum, sum ikki kemur aftur.

Tá eg spákaði í Skálavík hendan sunnumorgunin, varnaðist eg, at gøtan inn frá skálavíkarvegnum til skálan í Grind hevði fingið navnið Eiler Jacobsens gøta.

Á henda hátt heiðra skálvíkingar søldfirðingin, sum bleiv bygdarmaður teirra og leingi gekk undan í fiskiskapi um alt Norðruatlantshav.

Nú á gamalsaldri hevði hann í takklæti til bygdina og bygdafólkið útvegað eitt stórt jarðarstykki ovast í bygdini og var farin undir at byggja ein stóran skála til ymiska nýtslu. So stórar hallir og stovur hava valla verið í Sandoynni áður.

Eiler var eisini fiskiklógv. Royndi seg einamest í nótafiskiskapi, og var sildakongur í mong Harrans ár. Fyrst við "Boðanesi", so við "Ísborg" og "Sólborg" og "Krúnborg" og so framvegis.

Hann fekk alla endurnýggjanina av fiskiflotanum við. Sjálvur varð hann í fimmtiárunum biðin til skipara á triðja føroyska stállínuskipinum "Beinir" hjá Kimbil. Hann fylgdi við skipinum, tá tað varð selt til Ný Fundlands, og lærdi heimafólkið at fiska við línu.

Eiler Jacobsen var maðurin, sum setti gongd á tann stóra sildafiskiskapin hjá føroyingum í Norðsjónum. Sildavirkini í Føroyum kláraðu ikki at taka móti íslandssildini, sum nýbygningurin "Boðanes" úr Havn hevði fingið við nót.

Eiler hirdi tí alla leiðina til marknað í Hirtshals. Út aftur komin, kastaði hann 100 fjórðingar úr Lista, og har brendi hann í sild. Tað gingu fleiri mánaðir, áðrenn manningin á "Boðanesi" sá Føroyar aftur.

Teir lógu í føstum farti millum marknaðin í Hirtshals og fiskileiðirnar í Norðsjónum og skovlaðu bæði sild og pengar inn. Skjótt fór Eiler saman við øðrum at byggja síni egnu skip.

Sildaævintýrið var sera gott, meðan tað vardi. Síðani legði Eiler um til ymiskt annað. Svartkjafturin var bæði ringur og góður, og rækjurnar komu væl við eina tíð.

Men tað var í uppisjóarveiðuni, Eiler kendi seg mest heima. Hann dugdi væl at endurnýggja skipini og leggja tey til rættis til optimala úrtøku við góðari útgerð og nógvari ferð, so tey vóru skjót á marknaðin.

Báðir hesir úrmælingarnir vóru ágrýtnir. Tórstein lá ikki og bíðaði eftir fiskinum. Hann reikaði altíð millum plinkarnar at finna fongin, og Eiler stóð í samdøgur á brúnni og stýrdi leiting og fiskiskapi.

Mangar góðar fongir førdu hesir báðir til lands og kappingarneytarnir høvdu sjálvsagt altíð eyguni við, hvar teir vóru. Helst var okkurt at fáa har.

Øvundarfólk mundu teir eisini hava, men tað fellir teimum í lut, sum skara framúr. Raskir vóru teir og spardu seg ikki.

Við kvøðu

**Jógvan Arge**